# Lesiætlan og royndir

MusikkskúlaMiðnám

*Klassisk deild*

**Kompositión**

***skeiðslýsing***

## Upptøkuroynd

**??**

## 1. - 3. árið

### Mál

At næmingurin – aftaná trý ár - skal gerast førur fyri at standa upptøkuroynd í kompositión á hægri lærustovni.

### Endamál

Støði verður tikið í estetiska viðførinum hjá næminginum.

1. At næmingurin skal læra at kenna ymsar tónleikaformar. Bæði siðbundnar og nýggjar. Og útfrá hesum gerast førur fyri at skapa egnar tónleikaformar.
2. At næmingurin skal læra um ymsu ljóðførini og ymsar nútímans spæliteknikkir.
3. At næmingurin skal vera væl og virðiliga kunnaður um tónlistasøguna og kenna týðandi verk frá ymsum tíðarskeiðum.
4. At næmingurin skal læra at instrumentera, við at studera partitur hjá øðrum komponistum, og at gera egnar royndir.
5. At næmingurin skal fáa venjing í at skapa tónleik til ymsar bólkasamansetingar og einstaklingar.

### Teori triðja ári

Næmingurin fær frálæru í romantiskari harmonisering og fugateknikki.

### Innihald

1. Frálæru í at menna handverkið í “skapandi tilgongdini”
2. Frálæra í siðbundnari og nýggjari formlæru
3. Frálæru í instrumentation
4. Frálæru í tónlistasøgu

## 1. - 2. - 3. ársroynd

### Próvtøkuháttur

1. Næmingurin skal lata inn tvey verk.
2. Næmingurin skal greiða frá innihaldi og formi í verkunum.
3. Fyrsta og annað árið skullu verkini spælast á teldu.
4. Triðja árið skal eitt ella bæði verkini spælast “live”.